**Forseti Íslands,**
**Ólafur Ragnar Grímsson,**
**heilsan á vitjan í Føroyum**
**28. juni 2001**

Kæru Føroyingar
Løgmaður
Borgarstjóri
Góðu vinir

Eg fari at heilsa tykkum inniliga frá íslendingum og takki fyri blíðskapin, nú tit hava boðið mær at vitja oyggjar tykkara.

Føroyingar eru Íslandsvinir í serflokki. Søgan, mentanin, málið – alt knýtir okkum saman.

Vit eru fiskiveiðusamfeløg, og í øldir hevur hjallurin verið á sjónum.

Tá ið eg vaks upp vesturi á Vestfjørðunum, var tað altíð ein stórhending at fáa føroyskar sjómenn á vitjan. Vit vitjaðu umborð hjá teimum og spældu fótbólt við skipsmanningarnar uppi á landi.

Kring Ísland eiga fólk góð minnir um bondini millum Føroyar og Ísland, og íslendingar vilja gjarna menna samstarvið okkara millum í øldini, sum nú er byrjað.

Vitjan mín staðfestir, at vit í framtíðini fara at standa enn tættari saman.

Vit vilja menna vinnulívssamstarvið og økja um handil og mentanarsamskifti soleiðis at tjóðirnar í útnorðri kunnu standa sum ein sterkari eind.

Vit vilja framvegis halda okkum at gamni sum sannir vinir, og eg havi glett meg leingi til hesar dagarnar her í Føroyum.

Heima í Íslandi rópa vit fegin eitt fýrafalt hurrá, tá ið løtan er rík og stór, og eg vil fegin biðja tykkum øll at heiðra vinalagið millum føroyingar og íslendingar við at rópa eitt fýrafalt hurrá. Vinalagið millum føroyingar og íslendingar leingi livi!